## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av vestri, um kvøldið minni vindur. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 2 og 5 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum og ælingur, partvís kavi og hitin millum frostmarkið og +3 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av norði, um kvøldið veksur hann vindin upp í ein strúk. Ælingur, partvís kavi og hitin millum frostmarkið og +3 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin skrið ella stormur av útnyrðingi, sunnudagin minkar hann vindin niður í stívt andøvsgul. Kavaælingur, men sunnudagin sólglottar. Hitalagið millum frostmarkið og ÷4 stig.

# So leingi kavin lá, stóð hesin

**Mangir eru stuttleikarnir, tá kavin liggur. Næmingar í 2. ð í studentaskúlanum í Hoydølum fingu meginpartin av kavavikuni at ganga við at gera hendan »kavamannin«**

*Uppreistrarsinnaðu næmingarnir í Hoydølum spøkja aftur*





KAVI

Tað er meiri sjáldsamt, at kavin verður liggjandi í meira enn einar tveir dagar, men hesin kavin, sum nú er burtur, lá longi. Um tað var fyri, at skapningurin á myndini skuldi kunna standa sum longst, er ikki gott at vita.

Men drúgvi kavin fekk mong at fara út at spæla sær í kavanum. Næmingar í Hoydølum fóru eisini út, og tá kom til sjóndar, at nakað at uppreistrinum í Hoydølum er framvegis í næmingunum. Tey tímdu ikki at gera ein vanligan kavamann. Og fóru heldur í holt við at gera ein øðrvísi kavamann. Eitt stórarbeiði, sum tók meginpartin av einari skúlaviku.

Um tey somuleiðis fingu frí úr tímunum til at evna hann til, er lítið sannlíkt. Men kanska onkur teirra hevur stolið sær eina fríløtu til at arbeiða við »listaverkinum« evnað úr kava og ísi. Og teirra merki var so sanniliga eisini sett á, tí tey vildu ikki hava, at nakar ivi skuldi vera um, hvør stóð aftan fyri »listaverkið«.

Um hesin »kavamaðurin« á myndini hevur vakt andstygd, øði ella látur millum fólk, skal her verða ósagt. Men hann fekk frið at standa, so longi kavin lá. Nú er helst lítið eftir av honum.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷20 |
| Nuuk | ÷13 |
| Qaqortoq | ÷5 |
| Ammassalik | ÷7 |
| Saint John's | 0 |
| Halifax | ÷1 |
| Reykjavík | ÷6 |
| Seyðisfjørður | 2 |
| Tórshavn | 4 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 6 |
| London | 13 |
| Tromsø | 0 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 4 |
| Helsinki | ÷3 |
| Moskva | – |
| Berlin | 10 |
| Warzawa | 1 |
| Kiev | ÷3 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 12 |
| Róm | 13 |
| Malorca | 13 |
| Athen | 13 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 17 |
| Beijing | 2 |
| New Dehli | 16 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 28 |
| Sydney | – |
| New York | 1 |
| Miami | – |
| Los Angeles | 13 |
| Meksikobýur | 13 |
| Panama | 31 |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 26 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 962 hPa. sunnan fyri Ísland fer spakuliga í landnyrðing. Eitt annað lágtrýst, 977 hPa. vestan fyri Írland fer í landnyrðing og dýpist.




Lágtrýstið við Vestur-Noreg stendur mestsum í stað og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósdagin.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 02/02 kl. 06[00]– 03/02 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 5,2°
Minsti hiti máldur í feb.: ÷11,0° - Mesti hiti máldur í feb.: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 18,5 mm – mált frá 02/02 kl. 06[00]–03/02 kl. 06[00]
Avfallið higartil í februar: 18,6 mm

www.sosialurin.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

29. januar: Fyrra kvarter
31. januar: Mánin longst frá jørðini
6. februar: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2004

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 4. feb | 05.16 | 17.40 | 04.16 | 16.40 | 04.31 | 16.55 | 07.16 | 19.40 | 08.16 | 20.40 | 03.31 | 15.55 | 02.31 | 14.55 | 05.31 | 17.55 | 06.31 | 18.55 | 05.01 | 17.25 | 06.16 | 18.40 |
| 5. feb | 06.04 | 18.28 | 05.04 | 17.28 | 05.19 | 17.43 | 08.04 | 20.28 | 09.04 | 21.28 | 04.19 | 16.43 | 03.19 | 15.43 | 06.19 | 18.43 | 07.19 | 19.43 | 05.49 | 18.13 | 07.04 | 19.28 |
| 6. feb | 06.45 | 19.07 | 05.45 | 18.07 | 06.00 | 18.22 | 08.45 | 21.07 | 09.45 | 22.07 | 05.00 | 17.22 | 04.00 | 16.22 | 07.00 | 19.22 | 08.00 | 20.22 | 06.30 | 18.52 | 07.45 | 20.07 |
| 7. feb | 07.29 | 19.50 | 06.29 | 18.50 | 06.44 | 19.05 | 09.29 | 21.50 | 10.29 | 22.50 | 05.44 | 18.05 | 04.44 | 17.05 | 07.44 | 20.05 | 08.44 | 21.05 | 07.14 | 19.35 | 08.29 | 20.50 |

5 707265 100036 >